# Hósdagur 15. juni

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Magnus Jørgensen í Hoyvík lesur
7.15 **James Last** spælir írsk løg
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Kári Olsen er vertur
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Magnus Jørgensen í Hoyvík lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Miðvikan** (e) - Kári Durhuus og Per Højgaard leggja til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.18 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Summar 2000** - Theodor Olsen, Jákup Sørensen og Ginna Midjord leggja til rættis
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Summar 2000**
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Alpha Proxima**
18.00 **Barnaløtan**
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
18.50 **Tónleikur**
19.00 **Sjórán og sjórænarar vestan hav** - Árni Joensen skrivaði. Ove Olsen leggur til rættis
19.30 **Løg mær dámar** - Halgir Arge velur løgini
20.00 **Tíðindi**
20.05 **Kvøldarstundin** - Jákup Magnussen leggur til rættis
21.00 **Studio 4** - Maria Abrahamsen stílar fyri
22.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
14.30 **Barnalindin**
17.00 **M & M's** - Sending fyri tannáringar
18.00 **Dagsins orð** eftir Svenning av Lofti
18.05 **M & M's** heldur fram
19.00 **Brot og bitar** - Ein viðkomandi tíðindasending v / Britt Rasmussen og Eyvind Bringsberg
20.00 **Barnalindin** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð** (e)
20.55 **Dagsins orð** (e)
21.00 **Bønarlinjan við gesti** - Bønarevni kunnu ringjast inn á tlf. 321377, Fax 321379.

**Rás 2**

8.00 **Morguntónleikur** - Lættur blandaður tónleikur
9.45 **Orðið** - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis** - Beinleiðis sending við tónleiki og práti - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Dansitónleikur fyri vaksin**
13.00 **Føroyskur tónleikur**
14.00 **Laila Beinleiðis** - Beinleiðis countrysending
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Lættur tónleikur**
16.00 **KT R@sin** - Kunnandi ungdómssending fyri ung og eldri. - Um kunningartøkni í víðastu merking í samstarvi við Føroya Tele.
17.00 **Barnaløtan** - Oddbjørg og Lissi leggja til rættis
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
19.00 **Náttúra og umhvørvi**
20.00 **Ungdómstónleikur**
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Orðið** (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 **GirlZone** - Beinleiðis ungdómssending við gestum. - Anita Ottosen, Ruth Reinert og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@ras2.fo
24.00 **Góða nátt**

**svf**

18.30 **Øskufía** 23:26
19.00 **Teknifilmur**
19.30 **EM-fótbóltur: Svøríki–Turkaland** - fyrri hálvleikur
20.30 **Dagur og Vika**
20.45 **EM-fótbóltur: Svøríki–Turkaland** - seinni hálvleikur
21.45 **Krimitímin: Ruth Rendell - dagurin ið hvarv**
22.35 **Ferðafrásøgn: India**
23.25 **Liðugt**

**EUROSPORT**

2.00 **Football**
2.15 **Football**
2.30 **Football**
2.45 **Football**
3.00 **Football**
4.00 **Football**
4.15 **Football**
4.30 **Football**
5.30 **Football**
5.45 **Football**
6.00 **Football**
6.15 **Football**
7.15 **News**
7.30 **Football**
8.30 **Football**
10.30 **Football**
11.30 **Football**
13.00 Live - **Tennis**
17.00 Live - **Athletics**
19.00 Live - **Football**
19.30 Live - **Football**
22.00 **News**
22.15 **Football**
23.15 **Football**
23.30 **Football**
23.45 **Football**
0.00 **Football**
1.00 **Football**
2.00 **Close**

**3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
9.00 **Den sorte hingst**
9.25 **Hvide Løgne**
9.55 **Magnum**
10.50 **Horton-sagaen**
11.40 **Horton-sagaen**
12.30 **I lyst og nød**
13.00 **Sjov og Spas**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Baywatch**
15.45 **Vild med dig**
16.15 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.20 **Sportsnyheder**
17.25 **Vejret**
17.30 **Sjov og spas**
18.00 **Sabrina – skolens heks**
18.30 **Ellen**
19.00 **Family Law**
19.55 **Feriefilm: Spionerne der elskede mig**
21.40 **Pernilles Univers**
22.45 **Dagens Nyheder på TV3**
22.55 **Vore værste år**
23.25 **Ti tommelfingre**
23.55 **I lovens navn**
0.50 **I lyst og nød**
1.20 **Monty Pythons flyvende cirkus**
1.55 **Far er major**
2.25 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.55 **High 5**
3.25 **Godnat**

**BBC WORLD**

0.00 **News – Weather**
0.30 **HardTalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Rough Guide to the World: »Rajasthan«** 2:4
2.00 **News – Weather**
2.30 **Reporters**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HardTalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **News – Weather**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **News – Weather**
7.30 **HardTalk**
8.00 **News – Weather**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **News – Weather**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **News – Weather**
10.30 **HardTalk**
11.00 **News – Weather**
11.30 **Rough Guide to the World: »Rajasthan«** 2:4
12.00 **News – Weather**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **News – Weather**
13.30 **HardTalk**
14.00 **News**
14.15 **World Business Report – Weather**
14.30 **Top Gear**
15.00 **News – Weather**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **News – Weather**
16.30 **Asia Today**
17.00 **News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **News – Weather**
19.30 **HardTalk**
20.00 **News – Weather**
20.30 **Click Online**
21.00 **News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **News – Weather**
22.30 **World Business Report**
22.45 **World Sport**
23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC PRIME**

0.00 **TLZ: »Wheeler on America«**
1.00 **TLZ: »Sience in Action – Sound**
1.20 **TLZ: »Sience in Action – Electricity«**
1.40 **TLZ: »Sience in Action – Photosynthesis«**
2.00 **TLZ: »Hotel Hilbert«**
2.30 **TLZ: »Finding a Balance«**
3.00 **TLZ: »Evaluating Pre School«**
3.30 **TLZ: »Teletel«**
4.00 **TLZ: »Revista«**
4.15 **TLZ: »Revista«**
4.30 **TLZ: »Spanish Globo«**
4.35 **TLZ: »Susanne«**
4.55 **TLZ: »Spanish Globo«**
5.00 **Back to the Floor: »A Copper's Lot«**
5.30 **TLZ: »The Ozmo English Show«**
6.00 **Noddy: »Noddy has an Afternoon Off«**
6.10 **William's wish Wellingtons: »Pirate William«**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **The really Wild Show**
7.00 **Barmy Aunt Boomerang**
7.15 **Barmy Aunt Boomerang: »Mud, Sweat and Gears«**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Wine Bar«**
8.20 **Change that: »Alexandra Palace«**
8.45 **Antiques Roadshow**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Inspectors: »Buxton«**
10.30 **Great Antiques Hunt**
11.00 **TLZ: »The Ozmo English Show«**
11.30 **Can't cook, won't cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Ragley Hall«**
13.00 **Style Challenge: »Norman Wisdom«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Can't cook, won't cook**
15.00 **Noddy: »Noddy has an Afternoon Off«**
15.10 **William's wish Wellingtons: »Pirate William«**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **The really Wild Show**
16.00 **Barmy Aunt Boomerang**
16.15 **Barmy Aunt Boomerang: »Mud, Sweat and Gears«**
16.30 **Top of the Pops Classic**
17.00 **Keeping up Appearances**
17.30 **House Detectives: »Abbey Mill House«**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Battersea Dogs Home**
19.00 **2 Point 4 Children: »Badger's End«**
19.30 **One Foot in the Grave: »Rearranging the Dust«**
20.00 **Casualty**
21.00 **Ruby Wax meets... »OJ Simpson«**
21.30 **Top of the Pops Classic**
22.00 **Common Pursuit**
23.30 **Songs of Praise**

***SvF – Hósdagur kl. 21.45:***

### *Krimitímin:*

## *Ruth Rendell – dagurin ið hvarv*

Enskt drama frá 1999

Hvønn mikudag vitjar átta ára gamli Richard ommu sína, men hendan mikudagin kemur hann ikki fram. Løgreglan leitar eftir honum men uttan úrslit. Júst sum eingin vón tykist at vera, kemur smádrongurin afturíaftur, at síggja til uttan mein, men uttan nakra hóming av, hvat hent er seinastu tímarnar.

Leikarar: Barbara Ewing, David Daker, Ben Brazier.

Leikrit: Doug Livingstone.

Leikstjórn: Matthew Evans.



***TV3 – Hósdagin kl. 19.00:***

## *Family Law*

Amerikonsk raðsending (Family Law)

Kurvabóltsstjørnan, Carnell Hall, er skelkaður, tí hann skal vera pápi at gentuni hjá lítlu Tanya Williams. Hann sigur seg vera lokkaðan til sex av komandi mammuni, og krevur av henni, at hon velur at gera nýtslu av fosturtøku. Hást Lynn er ímóti hesum, átekur Danny sær hetta málið. Lynn hevur tó eisini sítt at hugsa um, tí fyrrverandi klientur hennara, Neil Cutler, hevur enn ikki goldið fyri næsta hjúnarskilnaða sín.

***TV3 – Hósdagin kl. 19.55:***

### *Feriefilm:*

## *Spionerne der elskede mig*



Amerikanskur skemtifilmur frá 1990 (Near Mrs.)

Claude Jobert er ein ambitiøsur starvsmaður, sum er komin eitt hampuligt petti uppeftir í yrkisleið síni, har hann starvast á einum virki, sum ger elektroniskar komponentar til amerikanska herin.

Starvv hansara er í bæði Phoenix, Arizona og Los Angeles, har hann hevur skrivstovur, í alla staðni hevur hann eisini gift seg. Hetta ger tó eisini, at hann aloftast hevur nógv um at vera, og tí er hann glaður við, tá hann fær møguleikan at fara eina ferð til París.

Tíverri skal hann samstundis vera í herinum, og fyri at loysa henda trupulleikan, fær hann hin hálvbýtta Colin Philips at átaka sín leiklut. Hetta gerst byrjanin til ein sannan ruðulleika, og samstundis verður Jobert tikin til fanga av KGB í París.

***TV3 – Hósdagin kl. 21.40:***

## *Pernilles Univers*



Talkshow við Pernille Aalund

Hvørt ár verða millum 2 og 10% av øllum børnum undir 15 ár offur fyri seksuellum ágangdi. Hvussu kann hetta lata seg gera, og hvat kann gerast fyri at steðga hesum.

Tosað verður við fólk, sum í barnaárunum hava verið úti fyri misnýtslu, eins og tosað verður við foreldur at børnum, sum eru misnýtt.

***TV3 – Hósdagin kl. 22.55:***

## *Vore værste år*

Amerikonsk skemtiraðsending (Married With Children)

Vanlukkan er ein staðfesting, tá heilaga altarið hjá Bundy-húskinum, sjónvarpið, brennir saman. Jefferson veit tó at siga um eina spurnarkapping um ítrótt, har til ber at vinna 10.000$. Al fer til royndarupptøkur, og hann megnar eisini at svara ølum spurningum, men sjónvarpsfelagið er als ikki áhugað í at hava ein somikið vitugan persón í sendingini.

Al finnur tó upp á ráð. Hann leutr nevnliga Kelly stilla upp í sendingini, og fortelur henni síðani alt, sum hann veit um ítrótt. Trupulleikin er bara tann, at Kelly er Kelly, og tí er sjálvandi ikki lætt at læra hana nakað sum helst.







# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Klárir til oddauppgerð

*HB greiddi setningin, tá teir mikukvøldið vunnu útsetta dystin móti FS Vágum, og nú kann havnarliðið so at siga sjálvt avgera lagnu sína*

JÁKUP MØRK

FS Vágar-HB 0-2 (0-1)

Setningurin hjá báðum liðum tóktist purastas greiður, tá FS Vágar og HB fóru á vøllin í góðveðrinum vesturi í Sørvági mikukvøldið.

Fyri bæði liðini vóru trý stig av avgerandi týdningi, men orsøkirnar til hetta vóru tó ymiskar. Gestirnir úr Havn høvdu við sigri møguleika fyri at nærkast toppinum á stigatalvuni enn meira, áðrenn teir leygardagin hitta grannarnir, sum í løtuni eiga fyrsta plássið.

Hjá heimaliðnum var øðrvísi statt. Bert tveir javnleikir í seks dystum er langt ífrá nøktandi, og hóast talan var um eina sera trupla uppgávu, so átti hetta at viðført, at vágaliðið blakaði alla trygd fyri borð, og ístaðin gjørdi eina roynd at basa gestunum.



*Bárður Mortansson var ikki eins sjónligur og vanligt, men var kortini ein støðug hóttan saman við Andrew av Fløtum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

### Stóu stillir

Royndin sá tó ongantíð út til at gerast nøkur hóttan, tí satt at siga allan fyrra hálvleik var talan um einvegis ferðslu. HB var snøgt sagt við yvirlutan í øllum lutum.

Bóltførleiki og leikferð var nógv hægri hjá havnarmonnunum, men fram um alt, so tordu teir at spæla. Uttan alt ov nógv hóvasták varð bólturin spældur millum ymsu leikararnar, og sjáldan ella ongantíð varð farið til høvuðsleyst sparkarí inn móti brotsteiginum hjá mótstøðuliðunum.

Heimaliðið fekk snøgt sagt ikki eitt bein til jørðina. Fingu teir fatur á bóltinum, varð hesin alt ov skjótt tveittur burtur. Fyrst og fremst tí menn ikki tordu at bjáða seg til, og at avleveringsmøguleikarnir tískil vóru onkustaðni millum fáir og ongir.

Við hvørt varð roynt við langum sendingum fram til Birgir og John, men í luftspælinum vóru Hans og Símun at kalla einaráðandi, so hesum spurdist einki burtur úr.

### Andrew revsaði verjuna

HB hevði fleiri upptrekk til opnar møguleikar, men burtursæð frá eini væl sæddari sending frá Andrew til Pætur, varð talan ikki um teir stóru møguleikarnar.

Um miðjan hálvleikin fekk Andrew, sum allan dystin var ein støðug hóttan, tó bæði pláss og stundir til at snara sær, og skotið frá brotsteigarmarkinum sat dygst úti við stólpan.

Eitt væl skotið mál, men hinvegin eisini úrslit av vánaligum verjuspæli. Eingin vágamaður tók avgerð um at verja fyri, tá Andrew fekk bóltin, og hetta vórðu teir eisini revsaðir fyri.

Fleiri aðrar ferðir var um reppið, at talan gjørdist um opnar málmøguleikar, meðan heimaliðið allan fyrra hálvleik bert hevði ein rættuligan málvøguleika. Hesin var eisini um at vera upptaktin til ársins mál, men fluktarin hjá Birgiri fór upp um málið, og so var hetta av ongum.

### Vardu leiðsluna

Í seinna hálvleiki løgdu gestirnir seg longur aftur á vøllin, og hetta gav so møguleika hjá gestunum at ota seg longur niðan á vøllin.

Hetta eydnaðist eisini hampuliga væl, og tað var sjónligt, at tað hjálpti um spælið á miðvøllinum, at Ari varð trektur inn á vøllin, ístaðin fyri at liggja í vinstra borði, har hann hevði verið fyrra umfarið.

Rættuliga vandamikir gjørdist teir á heimaliðnum tó ikki, tá sæð verður burtur frá deyðbóltsstøðum, har tað einar tvær ferðir var um reppið, at úrslit spurdist burtur úr.

Tað lá tó líka sum í luftini, at tað kanska heldur fór at verða HB, sum avgjørdi dystin við enn einum máli.

Í skjótum mótálopum eydnaðist tað bæði Bárða og Andrew at sleppa leysir, men meðan Bárður ikki fekk nóg gott tamarhald á bóltinum, so bankaði Andrew bóltin upp undir yvirleggjaran og út aftur í spæl.

Talan var eisini um aðrar heilar og hálvar møguleikar, men tá tveir minuttir restaðu at spæla, eydnaðist tað Halli at finna Andrew við eini langari sending, og so avgjørdi vandamikli framherjin dystin.

### Eingin uppliving

Sum heild, var talan ikki um nakað fotbóltsupplivilsi. Til tess var munurin millum liðini alt ov sjónskur.

So leingi munurin bert var upp á eitt mál, varð nakað av spenninginum tó varveittur, og flestu áskoðararnir sóu eisini út til at njóta góða veðrið.

Burtursæð frá eini hending móti endanum, tá Darius átti at fingið reyða kortið, fyri at sláa Vagn við álboganum, var talan yvirhøvur um ein »reinan« dyst, har dómarin alla tíðina hevði tamarhald á tí mesta sum fyrifórst.

Tá HB fekk seinna málið, mistu áskoðararnir tó mótið, og hóast tey flestu longu vóru farin vónsvikin avstað, tá dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð, so mundu tey tó vera samd um, at dysturin hevði funnið rætta vinnaran.

Skal FS, sum tey rópa tað har vesturi, bjarga lívinum í deildini, verður tað eftir øllum at døma ikki móti HB at hesi skulu fást, var greiði boðskapurin tey fingu mikudagin.

### FS Vágar-HB 0-2 (0-1)

0-1: Andrew av Fløtum 25.
0-2: Andrew av Fløtum 88.

**FS Vágar:**
Remigius Mikoliunis – Emil Hentze, Darius Magdisauskas, Zilvanuis Zudis, Rimvydas Bakus – Sjúrður Ellefsen, Hannus Olsen, Eyðfinn Fjalsbak, Albert Ari Thomassen – Birgir Joensen, John Johannesen

**HB:**
Bárður Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rói Árting, Pætur Dahl – Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum



# Renning á Norðoyastevnu

*Føroya Bjór Renningin á Norðoyastevnu í ár fekk sera góða undirtøku*

Ikki færri enn 160 luttakarar vóru til renningarnar.Tey bæði seinastu árini hevur luttøkutali verið 120. Tað sum gjørdi munin í ár var tann sonevnda "firma-staffettin" har í heili 14 lið, við 3 luttakarum í part, vóru við. Renningin gekk væl at avgreiða og var veðrið eisini til vildar hendan dagin, sól og eitt lítið lot. Hetta var fjóðra ári at runnið bleiv runt Lítla Eið og hevur luttøkan verið støðugt veksandi. Fyrsta árið vóru gott 70 luttakarar og í ár vóru 160. Nógv tann størsti parturin av luttakarnum er børn og tað er sera gott, men tey vaksnu skullu ikki halda seg burtur. Og tað høvdu fyrireikarnir úr Treysti gjørt nakað við við at skipa fyri eini "firma-staffett".

### Somu vinnarar sum Flaggdagin

Hjá monnunum vóru nummar eitt og tvey teir somu sum Flaggdagin. Bogi Lenvig vann aftur hesaferð á Guttormi Sørensen og verður tað ikki lætt hjá Guttormi at taka hann aftur í summar. Bogi Lenvig, sum er ein av Føroya bestu svimjarum, hevur veruliga gjørt vart við seg í tveimum teimum fyrstu umførunum av Grand Prix kappingini hjá monnunum í ár. Hann hevur áður gjørt vart við seg í renning, tá hann var yngri og rann við børnunum.

Hjá kvinnunum vóru tríggjar tær fyrstu á mál tær somu sum Flaggdagin, við tað at Rigmor N. Joensen vann frammanfyri Sunnuvu Bjarnastein og Tordis D. Eiriksfoss. Tað ger, at støðan í Grand Prix kappingini er óbroytt. Hjá monnunum hevur Bogi Lenvig nú 80 stig, Guttorm Sørensen 68 stig meðan Sølvi R. Hansen er komin uppá triðja pláss við 56 stigum. Hjá kvinnunum hevur Rigmor N. Joensen 80 stig, Sunnuvá Bjarnastein 68 stig og Tordis D. Eiriksfoss 60 stig. Í liðkappingini hevur Bragdið nú lagt seg klárt á odda við 182 stigum, frammafyri Treysti við 101 stigi og Roysnið við 74 stigum.

### Somu børn ár um ár

Eitt sum fyrireikarnir eru sera fegnir um er, at tað eru fleiri børnunum sum luttaka ár eftir ár. Fyrst í bólkinum undir skúlaaldur og seinni í bólkinum í skúlaaldri, og summi fyrst í bólkinum í skúlaaldri og so við teimum vaksnu. Fleiri av børnunum hava verið við øll fýra árini, runnið hevur verið runt Lítla Eið. Eisini koma børn og vaksin aðrastaðni frá úr landinum at luttaka í Føroya Bjór Renningini.

### "Firma-staffett"

Sum nakað nýtt varð skipað fyri einari "firma-staffett" har trý starvsfólk frá sama virki/stovni skuldu renna 1 umfar ella 675 m í part. Hetta er nokk fyrsta kapping av hesum slag í nýggjari tíð. Tað luttøku heili 14 lið og vóru øll samd um at hetta var nakað, sum var komið fyri at vera. Og á úrslitalistanum sást at tað var nógv gott fólk við í hesi kapping. Onkur luttakari helt at tað var heldur langt at renna 675m, men tað er sami teinur sum børn undir skúlaaldur renna. So til tey sum hildu tað verða ov langt at renna hendan teinin, er at siga, at tey nú kunnu venja í eitt heilt ár, tá næsta "firma-staffett" verður.